# Sjeyti ára minni - fyrr og nú

**Her eru tvær myndir, ið eru tiknar við 70 árum ímillum, onnur í 1935 og hin í 2005. Um onkur hevur av lesarum okkara hevur okkurt at viðmerkja í samband við myndirnar eru hann ella hon vælkomin at seta seg í samband við Hjørleif Kúrberg á tlf. 220279 ella 314049.**



*Henda myndin er tikin í 1935 á horninum J. C. Svabosgøta og V. U. Hammersheimbsgøta. Martin Kúrberg sæst sita í sínum Chevrolet bili ágang 1929.*



*Á myndini frá í dag, sjeyti ár seinni, síggja vit sonin Jørleif Kúrberg við sínum bili, einum Mercedes-Benz, á sama stað. Hómast kunnu nakrar broytingar, sum t.d. eru húsini har Telefonkioskin var í mong ár reist upp við einari hædd, og hjallurin hjá P. A. Restorff er tikin burtur, og handilsbygningurin er útbygdur, - og ikki minst, er munandi meira runnar og trævøkstur í dag enn tá. Á gomlu myndini síggjast húsini í Gríms Kambansgøtu har Zacharias Sørensen búði eitt skifti, men eru hesi í dag fjald av trævøkstri.*

Eysturoyar Røktar- og Ellisheim:

## 100 ára føðingardagur

TÍÐINDASKRIV

Við hesum vilja vit siga frá, at Frida Jacobsen úr Leirvík, sum nú býr á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi, verður 100 ár týsdagin 16. august 2005.

Í hesum sambandi verður opið hús, sum familjan, heimið og Leirvíkar kommuna skipa fyri í felag tann 16. august millum kl. 15 og 17, har øll eru hjartaliga vælkomin.

Í hesum tíðarbili verða eisini almenn umboð, stýrislimir og umboð fyri bý- og bygdaráðini í Eysturoy, boðin at heilsa upp á Fridu.

### Dagurin

**10. august. Laurentius. Lavrasmessa**. Laurentius var ein av teimum best kendu halgimonnum í Norðurlondum. Hann var prestur og skattmeistari hjá pávanum Sixtusi II. Í árinum 258 varð hann tikin og so illa píndur, at hann doyði. Navnið er latín og merkir hin *lavrberjakrýndi*.

## Nøvn í vikuni

**Kennir tú onkran …**



Kennir tú onkran í familjuni, á arbeiðsplássinum, í grannalagnum ella hvar tað skal vera, ið hevur ein merkisdag sum t.d. rundan føðingardag, brúdleypsdag, starvsdag ella onkran, sum hevur fingið nýtt starv ella annað, so sig okkum frá.

Tú skal bara skriva navn og bústað og um gjørligt aðrar upplýsingar eisini um tann persónin tú heldur eigur at koma í blaðteigin "Nøvn í vikuni", so taka vit okkum av restini. Tú er eisini vælkomin at senda okkum nøkur orð og um møguligt mynd. Annars hava vit góðar journalistar og fotografar til slíkar uppgávur.

Navn:....................................................................

Bústaður:.......................................................Tel:..................

Bygd/býur:....................................................................

Evt. arbeiðspláss:....................................................................

Merkisdagurin er: ....................................................................

Innsendari: .......................................................Tel:..................

Sendið lepan, í brævbjálva, til:
... Tórshavn • "Nøvn í vikuni"